14. grein: **Tanka-, samvitsku- og trúarfrælsi** Børn hava rætt at trúgva og tilbiðja. Samfelagið hevur skyldu at virða undirvísing í trúarlæru.	**27. grein:** **Lívskrøv** Børn hava rætt til hóskandi lívskrøv. Foreldrini hava høvuðsábyrgdina av, at hesi krøv verða lokin, og samfelagið hevur skyldu at hjálpa til, um tað er neyðugt.	**9. grein:** **Verja foreldranna av barninum** Børn hava rætt at búgva hjá foreldrunum, uttan so at mett verður, at hetta samsvarar ikki tørvi barnanna. Børn hava rætt til samband við bæði foreldrini, hóast tey ikki búgva hjá teimum. Er tað av samfelagsávum, at barnið er tikið frá foreldrunum, hevur samfelagið skyldu at knýta sambandið aftur við foreldrini.
32. grein: **Barnaarbeiði** Samfelagið hevur skyldu at verja børn fyri arbeiðsumstøðum, ið kunnu hótta teirra heilsu, upplæring og menning. Minstialdur og trygd eiga at verða fyriskipað.	**2. grein:** **Javnstøða og verja fyri mannamuni** Grundreglan um, at øll rættindi galda fyri øll børn uttan undantak. Tað er landsins skylda at verja børnini fyri øllum mannamuni.	**21. grein:** **Ættleiðing** Samfelagið hevur skyldu at tryggja at loyvi einans verður givið til ættleiðing, um tað er til barnsins frama.